LM-021/2025

FYLGISKJAL 2

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra: Katrin Jacobæus <katrin@javni.fo>
Sendt: 16. september 2025 10:11
Til: Heri Petersen; Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Javni - Vv. hoyringsskriv um inntøkumiss
Vedhæftede filer: Hoyringssvar_Javni inntøkumiss 16.09.25.docx

Góði Heri

Hervið okkara íkast til hoyring um inntøkumiss

Vh

Katrin Jacobæus
Dagligur leiðari
Tel. +298 514827
katrin@javni.fo

Javni
Hoydalsvegur 42
Postrúm 1133
FO 110 Tórshavn
Tel. +298 208090
www.javni.fo

LM-021/2025

Tórshavn 16.09.2025

Hoyringssvar frá Javna

til uppskot um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur

(Hækking av hægsta møguliga endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku)

Hægsta møguliga endurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslógini um almannatrygd og tænastur er í dag 27.779 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald. Við lógaruppskotinum verður hægsta endurgjaldið hækkað til 31.000 kr. um mánaðin.

Javni takkar fyri høvið at gera seg galdandi í hesum týdningarmikla málinum.

Vit fegnast um, at Almanna- og mentamálaráðið við hesum lógaruppskoti tekur stig til at bøta um fíggjarligu støðuna hjá teimum familjum, sum missa hægri lønir, tá ein av foreldrunum noyðist at gevast á arbeiðsmarknaðinum fyri at taka sær av barni við breki ella sjúku. At hægsta møguliga endurgjaldið verður hækkað til 31.000 kr. um mánaðin, er eitt týðandi stig, sum gevur hesum familjum størri tryggleika.

Tó vil Javni vísa á, at lógaruppskotið ikki bøtir um støðuna hjá teimum, sum hava lága inntøku, ella hjá teimum, sum eru nýútbúnir og ikki hava fingið fast fótafesti á arbeiðsmarknaðinum. Í verandi skipan fáa hesi annaðhvørt einki ella sera lágt endurgjald, tí tey ikki hava nóg mikið av inntøku at missa. Hetta rakar serliga ungar familjur, sum verða fíggjarliga trýstarar frá byrjan, tá tey hava eitt barn við breki ella sjúku.

Viðvíkjandi avsnittinum 'Møgulig sparing í barnaansingargjaldi ger, at útgjaldið lækkar samsvarandi', vil Javni benda á, at hetta ber ikki til at finna beinleiðis aftur í lógarorðingini. Hetta er eftir okkara fatan ógreitt og eigur at verða strikað. Les meira um galdandi skipan á Almannaverkinum her: https://www.av.fo/fo/utgjoeld-og-veitingar/inntoekumissur-endurgjald.

Sambært ST-sáttmálanum um rættindi hjá fólki við breki (CRPD) er verandi skipan ófullfíggjað, serliga í mun til:

- Grein 23, sum tryggjar, at familjulív hjá børnum við breki skal verjast og stuðlast á jøvnum føti við onnur.

- Grein 28, sum tryggjar rættin til sosiala trygging og ein rímiligan livistandard.

Tá stuðulin í verki ikki verjir hesar familjur nóg væl, verða teirra grundleggjandi rættindi ikki vird í fullan mun.

Javni mælir tí til:

1. At tryggja eina minstuinntøku, sum veruliga verjir tey lágløntu.

2. At taka serligt hædd fyri nýútbúnum foreldrum, sum hava mist møguleikan at koma inn á arbeiðsmarknaðin orsakað av, at tey mugu vera heima hjá barni við breki ella sjúku.

Vit fegnast um, at stig verða tikin til at bøta um støðuna hjá teimum við hægri lønum, men heita á, at skipanin eisini verður tillagað soleiðis, at hon verjir tey, sum hava minst – í tráð við ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki við breki og rættin hjá børnum og familjum til javnbjóðis lívsgóðsku.

Við vón um, at hetta verður tikið við í arbeiðnum,

Vinaliga

Katrin Jacobæus, Dagligur leiðari hjá Javna